## U17 skal til Rumenia

Í dag, mikudag 3. desember, var lutakast á UEFA høvuðsborgini í Nyon í Sveis til EM-undankappingina fyri U17 manslandslið komandi heyst. Lutakastið gjørdi ikki uppgávuna lættari fyri føroyska U17 liðið, tí tað kom í bólk við Spania, ið varð styrkismett sum tað sterkasta av øllum londunum. Hini bæði londini í føroyska bólkinum eru Rumenia og Litava. Londini komu ásamt um at spæla dystirnar í Rumenia. Dystirnir verða spældir 16., 18. og 21. oktober 2009.



## U19 til Serbia

Føroyska U19 manslandsliðið skal til Serbia at spæla EM undankapping komandi heyst. Tað gjørdist úrslitið av lutakastinum, ið hildið varð á UEFA høvuðsborgini í Nyon í Sveis í dag, mikudagin 3. desember. Føroyar komu í bólk við Serbia, Grikkaland og Hvítarussland. Londini komu ásamt um at spæla kappingina í Serbia í døgunum 6., 8. og 11. oktober 2009. U19 landsliðið var eisini í kapping við Hvítarusslandi í ár. Hóast hvítarussar vóru vertir fyri kappingini, so vunnu teir bert við 1-0 móti føroysku U19 monnunum, og tað enntá upp á eitt ógvuliga ivasamt brotsspark.

# Kapprenning undir toppinum

**Stóri dysturin í kvinnudeildini hetta vikuskiftið er í Havn, har Tjaldur kemur á vitjan hjá Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tjaldur hevur væl og virðiliga bitið frá sær í ár. Leygardagin spæla tær sera týðandi dyst á útivølli móti Neistanum, sum eisini vil hava tættari samband við oddaliðini*

Saman við Neistanum hevur Tjaldur í ár verið liðið, sum hevur kappast við VB og Stjørnuna um plássið millum tey bæði fremstu, sum við kappingarlok skulu stríðast um FM-heitið.

Higar til hava bæði Neistin og Tjaldur verið eitt lítið vet ov stutt í hesi kapping, og tí er dysturin leygardagin rættiliga avgerandi hjá báðum pørtum.

Tjaldur hevur støðugt víst, at tær á einum góðum degi kunnu takast við øll tey fremstu, og við javnleikinum móti Stjørnuni seinast prógvaði Neistin, at eisini tær eru um at finna rætta stevið.

Fyrsti dysturin millum tey bæði liðini var í fyrsta umfarinum av kappingini. Ta ferðina endaði tað við javnleiki, og tí eru øll útlit fyri einum spennandi dysti á Hálsi leygardagin.

Sunnudagin er so aftur tveir dystir á skránni, men tá eru favorittleiklutirnir nakað meira sjálvsagdir.

Hóast Stjørnan ikki hevur havt tað so lætt seinastu tíðina, so skuldi StÍF á útivølli ikki givið nakrar trupulleikar. Og tað ger tað neyvan heldur hjá VB, sum hesa ferð tekur ímóti Kyndli.

# Spenningur í Hoyvík

**Klassikarin er ikki tað, sum hann hevur verið, og tí er største spenningurin helst í Hoyvík, har StÍF kemur á vitjan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir landsliðssteðg skulu fremstu mansliðini í hondbólti aftur í eldin, og stóri spenningurin er hesaferð, hvussu tað fer at spæla av millum H71 og StÍF.

Bæði tvey hava í ár víst, at tey vilja verða partur av oddastríðnum í deildini, og í hesum tykjast innan hýsis dystirnir millum H71, StÍF, VÍF og Neistan at hava alstóran týdning.

Hinir báðir dystirnir hava greiðar favorittar á heimavølli. Hóast Neistin ikki hevur fingið spælið at koyra optimalt, so eigur styrkin at vera nóg stór til at taka KÍF á heimavølli, og í Vestmanna hevur Kyndil neyvan tann heilt stóra møguleikan at gera nakað við væl koyrandi VÍF.

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 195 | 160 | 35 | 12 |
| 2 Stjørnan | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 188 | 143 | 45 | 11 |
| 3 Tjaldur | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 184 | 156 | 28 | 9 |
| 4 Neistin | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 177 | 158 | 19 | 8 |
| 5 StÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 159 | 213 | -54 | 2 |
| 6 Kyndil | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 124 | 197 | -73 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 161 | 146 | 15 | 10 |
| 2 H71 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 159 | 140 | 19 | 8 |
| 3 Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 182 | 171 | 11 | 8 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 146 | 141 | 5 | 7 |
| 5 KÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 136 | 158 | -22 | 2 |
| 6 Kyndil | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 139 | 167 | -28 | 1 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 9 | 15 | 16 |
| 2 Fleyr | 8 | 5 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 10 |
| 3 Dráttur | 8 | 5 | - | 3 | 17 | 14 | 3 | 10 |
| 4 Mjølnir | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 5 ÍF | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 13 | 3 | 8 |
| 6 KÍF | 8 | 1 | - | 7 | 11 | 21 | -10 | 2 |
| 7 TB | 7 | 0 | - | 7 | 2 | 21 | -19 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 3 | 3 | - | 0 | 9 | 4 | 5 | 6 |
| 2 ÍF | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 4 | 4 | 4 |
| 3 Fleyr | 3 | 1 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 2 |
| 4 Mjølnir | 3 | 0 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

Dagur Klokkan Dystur
06.12 14.30 Neistin-Tjaldur
07.12 14.30 StÍF-Stjørnan
07.12 15.00 VB-Kyndil

**Atlantic Airways-deildin**

06.12 16.00 Neistin-KÍF
07.12 16.00 VÍF-Kyndil
07.12 16.00 H71-StÍF

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

06.12 16.00 SÍ-Mjølnir
07.12 14.00 Fleyr-KÍF
07.12 14.30 TB-ÍF

**Eik-ligan, menn**

06.12 14.00 SÍ-Mjølnir
07.12 14.00 ÍF-Fleyr